# Ein bankastjóri við nógvum vinum

**Fríggjadagin var móttøka í Føroya Banka, tá Jørn Astrup Hansen hevði sín seinasta arbeiðsdag. Hin stjórin, Janus Petersen, er nú einsamallur við leiðsluni**

MÓTTØKA

*Snorri Brend*

*Myndir: Jens Kr. Vang*



*Tvey stjórahjún – Jørn Astrup saman við konu síni Gunhild Søndergaard, og Janus Petersen saman við konuni Margret*

– Bankastjórar fáa sum útgangspunkt ongar vinir.

Soleiðis segði Jørn Astrup Hansen í samrøðu við Sosialin fyri tveimum vikum síðani.

Hetta segði hann eina viku undan sínum seinasta arbeiðsdegi. Og eina viku undan degnum, tá móttøka – ella avskeð – skuldi vera fyri honum, eftir at hava verið í bankanum seinastu 12 árini.

Men henda móttøkan vísti hinvegin, at hann hevur havt nógvar vinir – og framvegis hevur nógvar vinir í Føroyum.

Tað var nevniliga rættiliga trongligt í hølunum hjá Føroya Banka, tá starvsfólk, samstarvsfólk og onnur ynsktu at takka honum fyri árini í Føroyum.

## Danskur stjóri

Í áðurnevndu samrøðu sigur Astrup, at ein bankastjóri við hepni kann fáa nakrar góðar kenningar.

– Tað ljóðar eitt sindur kyniskt, men tað er nakað um tað. Hví heldur tú, at man valdi ein danskan stjóra í 1992? Tey fólkini, sum eg havi møtt í Føroyum, havi eg møtt gjøgnum bankan. Fleiri av teimum eru vorðin góðir kenningar, og nøkur av teimum vil eg næstan kalla mínar vinir.

– Tá man kemur til Føroyar sum fremmandur til tað arbeiðið, sum eg fekk í 1992/93, so verður man í ávísan mun verandi ein fremmandur. Men eg vil nú heldur ikki siga – og hetta er uttan nakran sum helst beiskleika – at tað føroyska samfelagið er so lætt at koma inn á. Eg havi heldur ikki ynskt tað, tí eg haldi, at tað hevði verið ópraktiskt við tí arbeiðsuppgávu, sum eg annars hevði í Føroyum, segði hann við blaðið.



*Niels Chr. Nolsen, stjóri á Elektron sigur farvæl við Astrup. Onkur fyndorð munnu verða søgd…*



*Jan Muller, blaðstjóri á Sosialinum handaði Astrup eina tekning eftir Óla P, har bankastjórin sæst mynstra av teirri føroysku skútuni*



*Tobbi hevur havt úr at gera í seinastuni: Hann hevur luttikið í beinleiðis útvarpssending hóskvøldið og hann helt røðu sunnudagin 1. mei. Men fríggjadagin var hann eisini við til móttøkuna í Føroya Banka*